UTTAN ÚR HEIMI

# Iran er næsta málið hjá USA

**Síðani seinasta summar hava amerikanskar serdeildir savnað upplýsingar um rakettstøðir og onnur hernaðarmál í Iran**

USA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Kendi amerikanski tíðindamaðurin Seymour Hersh, sum avdúkaði ta harðrendu framferðina hjá amerikonsku fangavørðunum í Abu Ghraib-fongslinum í Irak, avdúkar í einari grein í tíðarritinum The New Yorker, at USA er í ferð við at savna upplýsingar um møgulig bumbumál í Iran.

Hersh sigur seg hava fingið at vita frá einum embætismanni í verjumálaráðnum Pentagon, at tann politiska leiðslan har hevur hug at søkja at Iran. Endamálið við álopinum er at oyðileggja sum mest av tí hernaðarliga bygnaðinum hjá iranum, sigur embætismaðurin.

Sambært greinini hevur George W. Bush, forseti, skrivað undir boð, sum geva servandum hermonnum heimild til at søkja at málum í tíggju londum í Miðeystri og Suðurasia. Sambært heimildunum nýtist deildunum ikki at kunna politiska valdið í Washington um, hvat tær havast av. Heimildirnar eru sostatt rúmari enn tær, sum CIA virkar undir, skrivar Seymour Hersh.

Hann vil vera við, at USA hevur sent fleiri tílíkar deildir til Iran, har tær leita eftir og skráseta ymisk hernaðarmál, ið mugu metast at vera týðandi sum bumbumál í einum møguligum álopi. Samstundis hevur ovasta amerikanska herleiðslan fingið boð um at endurskoða eina gamla innrás í Iran. Sambært hernaðarserfrøðingum hevur USA ein stóran fyrimun nú, tí landið hevur hermenn í tveimum av granna-londunum hjá Iran og kann tí senda hermenn inn um iranska markið úr Irak og Afghanistan.

# 18 ára fongsul fyri fólkamorð



*Bosniaserbiski heryvirmaðurin Vidoje Blagojevic hevur fingið 18 ára fongsul fyri at hava verið uppi í hópmorðinum, tá serbar myrdu meiri enn 7.000 fólk í bosniska býnum Srebrenica í 1995. Ein starvsfelagi hansara, Dragan Jokic, hevur fingið níggju ára fongsul*
*Mynd: Reuters*

# Nógv meiri olja í Barentshavinum enn higartil hildið

**Olja og gass fyri 2.500 milliardir norskar krónur er í norska partinum av Barentshavinum**

OLJURÍKIDØMI

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Loyniligar metingar, sum oljufelagið Statoil hevur gjørt, og sum blaðið Aftenposten hevur fingið fatur á, vísa, at tað er nógv meiri olja í gassi í Barentshavinum enn higartil hildið.

Sambært hesum metingunum eru umleið 12 milliardir tunnur av olju og gassi í norska partinum av Barentshavinum. Við dagsins prísi svarar hetta til 2500 milliardir norskar krónur ella hálva triðju ferðir tað, sum er í almenna norska oljugrunninum, skrivar Aftenposten.

Kunningarstjórin hjá Statoil, Kristoffer Hetland, sigur við blaðið, at felagið hevur ikki nakrar neyvar metingar um, hvussu nógv olja er í Barentshavinum, men onnur oljufeløg, sum Aftenposten hevur tosað við, halda upplýsingarnar hjá blaðnum vera á góðari leið.

Oljumálaráðið í Oslo sigur seg heldur ikki hava nakra neyva meting um, hvussu stórt oljuríkidømið í Barentshavinum er.

## Byggja eisini tangaskip

Fyrr var russiska Sevmasj-skipasmiðjan í Severodvinsk kend fyri at byggja kavbátar til russiska herflotan. Tað ger hon enn, men í dag byggir skipasmiðjan eisini onnur før.

Aftenposten skrivar, at Sevmasj-skipasmiðjan hevur fingið eina bíleggingfrá norska reiðarínum Odfjell, sum hevur biðið russisku skipasmiðjuna byggja sær tólv tangaskip. Í fyrsta umfari er ætlanin at byggja átta skip fyri einar tvær milliardir krónur, skrivar blaðið. Tað fyrsta skal latast reiðarínum í 2007. Enn er ikki greitt, um skipasmiðjan fer at byggja skip fyri onnur norsk reiðaríir.

Men Sevmasj-skipasmiðjan er minni enn so givin at byggja kavbátar. Sambært Aftenposten hevur hon júst bygt fleiri kavbátar, sum kinesarar hava bílagt, og í einari byggihøll stendur ein kjarnorkurikin kavbátur, sum russiski herflotin skal hava.

## Leita eftir Columbusi

Spanskir granskarar siga seg nú hava varhugan av, hvar gamli sjófarin Christopher Columbus liggur grivin.

Sponsku granskararnir hava nú fingið loyvi at kanna ein gravstað í Dominikanska Lýðveldinum í Miðamerika fyri at vita, um leivdirnar av Columbusi liggja har. Ætlanin er at brúka tann nýggja DNA-kanningarháttin og at bera úrslitið saman við kanningar, sum eru gjørdar í spanska býnum Sevailla, har fleiri av skyldfólkunum hjá gamla sjófaranum liggja grivin.

Líka síðani Columbus doyði, hevur verið gitt, hvar hann bleiv jarðaður. Summar keldur vilja vera við, at hann bleiv jarðaður í Dominikanska Lýðveldinum, men onnur halda, at hann liggur grivin einastaðni í Spania.

## Einki myndatól

Í Avstralia umhugsa myndugleikarnir at banna fólki at hava myndatól við sær, tá tey fara oman á strondina at sóla sær ella at hugna sær á annan hátt.

Tað hevur víst seg, at nógvir menn hava myndatól við sær, og at teir hava serliga áhuga í kvinnum, sum liggja hálvnaknar og sóla sær. Hetta er ikki loyvt, og herfyri fekk ein maður 2500 krónur í bót, tí hann hevði tikið nakrar myndir av hálvnaknum kvinnum á einari sandstrond nærhendis Sidney. Um nakrar dagar skal ein annar maður í rættin, tí hann hevði tikið 75 myndir av hálvnaknum kvinnum á teirri somu strondini.

Løgfrøðingar siga, at tað er vónleyst at forða fyri, at fólk hava myndatól við sær oman á strondina. Víst verður á, at í dag kunnu fólk taka myndir við fartelefonini, og tá tey flestu hava fartelefon uppi á sær, verður tað ein vónleys uppgáva at kanna, hvør tekur myndir og av hvørjum, siga løgfrøðingarnir.

## Kvinnur við stavi

Higartil hevur tað vanliga verið so, at menn hava stjórnað orkestrum, men í seinastuni hava alt fleiri kvinnur nomið sær hesa útbúgvingina, og hjá fleiri orkstrum eru tað nú kvinnur, sum halda dirigentstavinum.

Á New York-leiðini hava trý av teimum stóru og kendu orkestrunum fingið sær kvinnuligan leiðara, skrivar New York Times. Tann 31 ára gamla Xian Zhang er hjálparleiðari hjá New York Philarmonic, 32 ára gamla Anu Tali, sum er ættað úr Estlandi, stjórnar New Jersey Symphony, og 40 ára gamla Andrea Quinn er sett sum leiðari hjá New York City Ballet.

New York Times skrivar, at fleiri ungar kvinnur hava fingið starv sum orkesturleiðarar seinastu árini, og at tær hava ikki havt stórvegis trupulleikar at fáa ta neyðugu viðurkenningina. Sambært blaðnum hava amerikanarar lætt við at góðtaka kvinnur sum dirigentar, meðan evropearar heldur vilja hava ein mann at halda stavinum.